# Velja út frá sínum áhugamálum

Hesar báðar seinastu vikurnar hava 9. floksnæmingar úr fleiri skúlum verið í starvsvenjing á ymsum arbeiðsplássum. Tað er ógvuliga ymist, hvørja vinnu tey 15 og 16 ára gomlu hava hug at royna seg í. Tey velja alt eftir, hvat hugurin stendur til. 9. flokspraktikantarnir á Sosialinum, Birita Debes og Hallbjørg J. Túgvustein hava hitt nakrar praktikantar



*Hannah Anthoniussen er 15 ár og gongur í 9. flokki í Tofta skúla. Hannah er í praktikk hjá Djóralæknastovuni í Havn. Hon er fegin um, at hon valdi hetta, tí henni dámar ógvuliga væl djór og vil fegin hjálpa teimum. Hon sigur, at tað er ógvuliga stuttligt at vera har. Hon hevur steriliserað kettur, gelt hundar og verið við til at avlívað djór.*




*Hans Jákup Rasmussen er 15 ára gamal og gongur í 9.b í Skúlanum við Løkin. Hans Jákup heldur, at tað er stuttligt at arbeiða í einari heilsølu, og valdi tí at fara í praktikk hjá Poul Hansen. Hans Jákup koyrir mest vørur út, men honum dámar best arbeiðsfólkið.*



*Bjørg Olsen er 16 ára gomul og gongur í 9.a í Skúlanum við Løkin. Bjørg dámar ógvuliga væl list , og tí hevur hon valt at fara í praktikk í leirlist hjá Guðrið Poulsen. Hon hevur hjálpt Guðrið við hennara prosjekti, og hon hevur eisini sjálv gjørt ting úr leiri. Bjørg sigur, at hetta er eitt spennandi og stuttligt arbeiði.*



*Jóannes Skibenæs er 15 ár og gongur í 9.b í Skúlanum við Løkin. Hann er í praktikk í Expert í SMS. Hann er ógvuliga glaður fyri, at hann valdi hetta, tí hann vildi royna at arbeiða í handli. Jóannes heldur tað vera ógvuliga stuttligt at arbeiða í handli. Hann hjálpir kundum, sum hava brúk fyri hjálp, tekur fyri við kassan og setir uppá hillar. Honum dámar væl hetta arbeiðið.*



*Kristina Jacobsen er 15 ár og gongur í 9. flokki í Vestmanna skúla. Kristina er í praktikk hjá Djóralæknastovuni í Havn. Hon valdi hetta praktikkplássið, tí hon hevur hugsað um læra til djóralækna. Kristina heldur tað vera stuttligt, og nógv spennandi er at gera. Kristina hevur steriliserað kettur, gelt hundar og verið við til at avlívað djór.*



*Astrið Foldarskarð er 16 ár og gongur í 9.a í Skúlanum við Løkin. Astrið er í praktikk í handlinum Gelluni í SMS. Hon valdi hetta, tí henni dámar væl klæðnahandlar. Hon sigur at tað er stuttligt, og er ógvuliga glað fyri at hon valdi hetta. Hon hevur prísað klæðir, hongt klæðir upp og lagt klæðir saman. Hon sigur, at alt er gott við hesum arbeiði.*



*Jákup Rasmussen er 15 ára gamal, og hann gongur í 9.b í Skúlanum við Løkin. Jákup hevur valt at fara í praktikk hjá Poul Hansen heilsølu. Jákup ætlaði sær til Havnar í praktikk, men visti ikki reiðiliga, hvagar hann skuldi fara. So nevndi onkur Poul Hansen, og tað helt Jákup verða eitt fínt hugskot. Jákup hevur koyrt vørur út í handlar, sett uppá pláss og stáplað fløskur. Men honum dámar best at koyra vørubil og lastbil, at hjálpa til, og ikki at gloyma fólkið, ið arbeiðir har.*



*Jórunn Hansen er 15 ár og gongur í 9.a í Skúlanum við Løkin. Hon er í praktikk í Gelluni í SMS. Hon valdi hetta arbeiðið, tí hon heldur, at tað er stuttligt at arbeiða í handli. Hon hevur prísað klæðir og koyrt vørur uppá pláss.*